## Mjølnir-kapping fyri ung

Leygardagin 26/1 verður árliga Mjølnirkappingin fyri yngri deildir í Klaksvík. Umleið 60 lið eru tilmeldað, og skulu 80 dystir spælast. Serliga hjá teimum heilt ungu, dreingir og gentur 10, eru nógv lið. Spælt verður í fimleikarhøllunum, í KÍ-høllini og í Badmintonhøllini. Fyrstu dystirnir byrja klokkan 9, og teir síðstu verða væntandi spældir um 17-tíðina. Fyrireikarnir vóna, at kappingin fer at ganga skjótt og væl, tí umstøðurnar í Klaksvík eru vorðnar so nógv betri nú, eftir at Badmintonhøllin er komin afturat hinum hallunum.



## Fimleikadagur hjá Støkk

Leygardagin 26. januar skipar STØKK fyri einum rimmar fimleikadegi fyri børn í aldrinum 1. – 7. flokk. Øll børn í hesum aldri kunnu verða við - bæði tey sum íðka fimleik og tey sum ikki hava roynt tað fyrr. Dagurin verður hildin í ítróttarhøllini í Runavík frá kl. 10.30 til kl. 14.00. Byrjað verður við at Silvi hitar upp og síðani sleppa børnini at royna seg í airtrack,springbana, bita, ringum, trampolin, springbana, ringum, forskotnari barr og í estestiskum fimleiki, so tey fara neyvan at keða seg. Kostnaðurin fyri barnið er 50 kr., og er okkurt leskiligt aftaná strævna dagin tá eisini íroknað.

# Spenningurin bara økist



*Mjølnirmenninir hava staðið seg sera væl og hava lagt seg á odda í bestu flogbóltsdeildini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eftir fyrru hálvu av kappingini í Meistaradeildini hjá monnum, var støðan tann at SÍ var greitt á odda, men tað er nú broytt, og nýggjur og spennigur tykist at vera komin í bestu flogbóltsdeildini hjá monnum**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Sum tað einasta liðið í bestu flogbóltsdeildini hjá monnum, mangla ÍF at spæla dyst í seinnu hálvu, og tískil gerst tað teimum eitt strævið vikuskifti, tí teir skulu spæla bæði leygardagin og sunudagin, móti ávíkavist Mjølnir og Fleyr.

### Kunnu taka oddasessin

Skuldi tað gingist ÍF eftir vild, kunnu teir gera sær tann stóra beina at gerast oddalið eftir vikuskiftið. Sum er liggur ÍF á einum triðja plássi við fýra stigum, og tað er eitt minni enn SÍ og trý minni enn Mjølnir.

Júst Mjølnir koma á vitjan á Kambsdali, og skuldi tað eydnast verður tað lagt upp til eitt satt brak í Havn sunnudagin, tá ÍF skal á vitjan hjá Fleyr, ið við styrkinum frá Fram herfyri, veruliga tykist at vera raknaðir við aftur.

### Tveir triðingar avgreiddir

Eftir vikuskiftið eru tveir triðingar av kappingini hjá kvinnunum spældir, og tað merkir at stigini verða hálveraði. Hetta merkir, at tað nærum verður til eina nýggja kapping, og ikki er lætt at spáða um hvat har fer at henda. Eitt er tó púra vist, og tað er at í tveimum av teimum fyrstu triðingunum hevur kvinnuliðið úr Sørvági verið nógv tað besta liðið, og liggja tær eisini á ovastu rók. Stóri spenningurin verður so hvussu fer at hilnast í seinasta triðinginum.



*ÍF í dysti móti Mjølnir*

*Savnsmynd*

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin